# Frágreiðing frá løgmanni 1971

Tað er vorðin siður, at løgmaður við tingsetanina gevur tinginum frásøgn, ið á mongum økjum ger upp støðuna og metir um framtíðarvánirnar.

---

Síðan seinastu løgmansfrágreiðing er skipað nýtt landsstýri av somu flokkum sum undanfarnu fýra árini.

Manningin er lutvís nýggj, men arbeiðið okkara verður fyri stóran part at byggja á støðið, tá bleiv lagt, og at fylgja teim rásum, tá vórðu træddar, men í summum førum kemur herðslan tó at verða løgd á aðrar tættir, serliga slíkar, sum umstøður ikki góvust til at fáa so langt ávegis, og er á mongum økjum ætlanin at royna nýggjar leiðir — at nýskapa møguleikar ella troyta ótroyttar møguleikar.

---

Eftir strævin ár við døprum útliti, fingu vit í 1970 fíggjarligt og vinnuligt viðrák, og við árslok var skurðurin vorðin so góður, at hann er hin besti, menn hava vitað um.

Fyri fáum árum síðani vóru vit í beinleiðis kreppustøðu, og vóru teir tí djarvir menn, sum hættaðu sær undir ta stórútbygging av skipaflota okkara, sum tá tók seg upp.

Tess gleðiligari er hjá hesum monnum eins og hjá teim, sum frá almennari síðu dyggiliga stuðlaðu hesi bygging og slóðaðu fyri henni, at vita, at hon — sum mett — gjørdist lykil, ið opnaði okkum dyr til at leggja í vaðið fullmannaðir, tá ið hovi aftur gavst. Uttan ta miklu bygging seinnu sekstiárini, høvdu vit enn í dag — hóast hækkingarnar í fiskaprísinum — ligið í kreppuherðingum.

Ein góð lýsing av árinum 1970 — tá vit seldu fyri 251 mill. kr. — er at finna í teim fyribilstølum yvir gjaldjavnvág, íløgur og bruttouppsparing, sum Búskaparráðið júst hevur greitt úr hondum.

| | |
|---|---|
| Gjaldjavnin 1970 sýnir eitt yvirskot upp á ............ | 49,2 mill. kr., |
| meðan 1969 gav eitt undirskot upp á ................ | 25,7 mill. kr., |
| Úrslitið í fjør er sostatt ein framgongd upp á .......... | 74,9 mill. kr., |
| Samlaðu íløgurnar í 1970 vóru ...................... | 133,6 mill. kr., |
| meðan tær í 1969 vóru ............................... | 153,9 mill. kr., |
| og í 1968 ..................................... | 133,0 mill. kr., |

Tær stóru íløgurnar í 1969 vóru skipaíløgur (63,5 mill. kr.), tað var hetta árið fleiri flakatrolarar og stórir línubátar komu til landið, samlaðu íløgurnar vóru tí óvanliga stórar tá.

| | |
|---|---|
| Bruttouppsparingin, sum er nýílogur + umvælingar og | |
| yvirskot á gjaldjavnanum var í 1970 ................ | 215,8 mill. kr., |
| í 1969 ........................................ | 161,2 mill kr., |
| og í 1968 var hon ................................ | 147,2 mill. kr., |

Her er talan um munandi og gleðiliga hækking. Hesi tøl Búskaparráðsins hava tó tann veikleika, at roknað er í dagsprísum, enn eru vit ikki nóg væl mannaði innan hagfrøðisliga virksemið til at gera statistik okkara í føstum prísum, tí verður útbyggjan av hagfrøðisligu orkuni fortreyt fyri, at vit skjótari og betri kunnu laða upp í tey lið, sum eru og koma á garðar okkara.

---

Likviditetur landskassans hevði fyri ikki langari tíð síðani serligan áhuga í føroysku pressu, ofta var sagt frá í bløðum og útvarpi, at nú sást botnur í landskassanum, ella nú treyt peningur í tílíkan mun, at vandi var fyri, at samfelagshjól steðgaðu. Hetta var gjørt uttan frásøgn um, at likviditetsstøðan ikki er nýtulig at meta orku landsins við.

Seinastu 2 árini hevur likviditeturin verið góður, men sýnist hetta ikki at hava sama áhuga. Í løtuni liggur hann dagliga um 12 mill. kr. - sum er 2-3 mill. kr. meir enn um somu tíð í fjør - og tá eru ikki upp í roknað tey likviditetslán, atgongd er til at nýta.

---

Fíggjarlógin 1971/72 er umleið 105 mill. kr., og fyrsta ársfjórðing eru av henni nýttar góðar 24 mill. kr., meðan í landskassan eru komnar góðar 26 mill. kr. somu tíð, av hesum 4 mill. kr. sum eftirgjald av gomlum skattaeftirstøðum.

Inntøkumetið beinleiðis skatti viðvíkjandi kemur óivað reiðuliga væl at halda, tí áðrenn umlíkningar og strikingar er skatturin nakrar milliónir hægri enn á fíggjarlógini mett, hetta hóast hækkaðan barnastyrk og frádrátt í landsskattinum hjá láginntøkum.

Hvussu verður við metinum um toll- og framleiðslugjøld er verri at

siga tíðliga í árinum, tí ávirkanin frá lættanum í tolli av maskinlutum, E.D.B. tólum o.ø. er ikki løtt at rokna út, tá ein ikki eigur fullfíggjaði hagtøl, men fyribils er útlit til, at metið heldur.

Skattaeftirstøðurnar minkaðu seinasta ár og vóru 31. mars 1971 av skattinum fyri 70/71 14,18% ella kr. 10.455.000 í móti 15,62% og kr. 10.888.000 31. mars 1970 av skattinum fyri 69/70.

Samstundis er, sum nevnt, nakað gingið inn av eldri eftirstøðum.

Tekur ein t.d. eftirstøðurnar fyri árini 1963-1968, vóru tær pr. 30.11. 1969 umleið 17 mill. kr., meðan tær fyri somu ár 30.11. 1970 vóru umleið 10 mill. kr.

Búskaparráðið hevur gjørt upp úrslitið av skiparakstrinum í 1970, tølini síggja væl betur út enn áður, og **eru tey løgd við sum skjøl** til hesa frágreiðing. Eisini annað taltilfar er hjálagt, og tað gevur fyri hann, sum áhuga hevur at kanna tað, rættuliga góðar lýsingar. T.d. sýna tey, at fiskimannainntøkurnar innan ymsu veiðihættirnar í meðal liggja úr kr. 23.400 upp í 64.800 kr. Lægsta talið er kr. 15.400 í manningaparti við einum línubáti, og hægsta talið er kr. 138.400 í manningaparti við einum nótaskipi.

**Útlit fyri árið 1971:**

Prísvøksturin á fiskavørum stendur — undantikið fiskamjøl og lýsi — við, og er tí úrslitið fyrra hálvár í ár enn betur enn í fjør, og tá goymsluvirðið 1. jan. 1971 er nærum tað sama, kann beinleiðis sambering gerast.

Fyribilsuppgerð sigur, at inntil 1. juli í ár vóru veidd 96.700 tons og útflutt fyri 127 mill. kr., meðan tølini 1. juli í fjør vóru ávikavist 95.200 tons og 110,1 mill. kr.

Útflutningsvirðið er soleiðis í mun til 1970 økt við 15%'um, og í mun til 1969 og 1968 við 93%'um ella tvífaldað.

Tí betur sær út til, at tann fleirtáttan av fiskivinnuni, strembað hevur verið í móti, stendur við. Fryst flak, saltfiskur, og bólkurin sild, sildavørur og ídnaðarfiskur geva mesta partin og vega nærum tað sama við 38 mill. kr. hvør, og her av sæst eisini, at aðrar vørur tellja munandi meir í dag enn fyri fáum árum síðani.

Nýggir veiðuhættir taka seg framvegis upp, so føroyingar sýnast ikki at hava mist evnini til at laga seg eftir galdandi umstøðum.

Fyri fáum árum síðani var flakið lítil partur, hemara, reyðu, laks og jákupsskel fiskaðu føroyingar als ikki, men í ár koma hesir bólkar kanska at geva stórútflutning; bert fyrra hálvár hevur verið fiskað fyri milliónvirði av reyðum í Grønlandi.

**Hesi evni til umleggjan mugu vit varveita, skal okkum verða lív lagað sum fiskivinnutjóð. Har við verið ikki sagt, at vit skulu gerast so leysir á nálini, at vit í heilum leypa úr einum veiðuhátti í annan.**

**Fiskivinnan — Veiðuorkan.**

Ílegingarskipaninar til skipabygging vóru bottar í 1967 og hava fingið ábøtur síðani. Tjak kann vera um, um tær í dag svara til tørvin, men at tær enn eru nóg góðar til ikki einans at halda skipaflota okkara viðlíka, men eisini til at økja hann, skerst ikki burtur.

Síðan ólavsøku 1970 eru komin til landið ella bygd her 28 før tilsamans, merkt til 4.486 tons. Av hesum vóru 14 fiskiskip yvir 20 tons, 6 før um 20 tons og 3 før um 15 tons. 3 farmaskip vóru bygd ella keypt - - í tonsatali 1364 tons - - og 2 ferjur upp á tilsamans 348 tons. Somu tíð fór úr skipaskránni eitt skip upp á 252 tons. Her er sostatt talan um eina nettoøking upp á 4.234 tons.

Tað hevur verið nevnt, at landsstýrið hevur ætlað at steðga skipabyggingini, ella í hvussu so er hevur trengt møguleikarnar so nógv, at trupult er at fáa bygt. Einki er so skeivt sum hetta.

Í løtuni eru í gerð fleiri fiskifør, og áhugin fyri at byggja ella keypa tykist ikki at linka, so tað er ikki neyðugt at bera ótta fyri, at ein neyðug og rímulig endurnýgging ikki skal fara fram. Skipanir, sum kunnu tryggja hetta, eru og skulu sjálvandi eisini vera.

Tað, sum landsstýrið hevur tosað um, er har aftur í móti,

**at** royna at tryggja eitt javnt lag - eina javna rytmu í skipabyggingina —

**at** sleppa undan skattaræðsluni, sum í mongum førum fær menn at investera uttan neyðugt umhugsni,

**at** avmarka vandan fyri, at nýggju kommanditfeløgini gera ov stóra fjøru í landskassanum, uttan at vit kunnu forða tí, og

**at** broyta studningsskipanina soleiðis, at vinnan fær møguleika fyri at lata nakað av peningi so líðandi fløða inn aftur í grunnin til endurnýggjan av skipaflotanum.

Orsakað av góða úrslitinum seinasta ár kom seinast í desember eitt tílíkt óvanligt trýst mót grunninum, parta- og kommanditfelagsskránni, lánistovnum og skipasmiðjum, at landsstýrið mælti til umhugsni og fekk í gongd eitt tjak um hvørja leið vit skuldu ganga í íleggingunum. Hetta, hugsi eg, var gott, serliga, tí vit jú eisini samstundis hovdu línudriftina og hennara trupulleikar at hugsa um.

Úrslitið bleiv, at nøkur skip løgdu um til aðra veiðu, - feskfiskaveiðu, sildaveiðu ella troling eftir ídnaðarfiski - nøkur fóru á saltfiskaveiðu aftur, og nakrir nýggir sáttmálar blivu gjørdir, og játtanir givnar. Eftir mínum tykki ein hepnari gongd, enn at allur flotin nú lá undir umbygging, og tí minni peningur kom til landa, meðan leyst var til alla bygging, ynski var um. Vit fáa nú vónandi tað javna lagið, sum best er fyri samfelagið alt.

Eisini tær broytingar í skattalógunum, sum landsstýrið skjýtur upp at gera, fara at virka fyri hesum.

Eg endurtaki, at landsstýrið hevur ikki ætlanir um at steðga skipabygging ella gera viðurskiftini hjá høvuðsvinnuni trupul; men hesi nevndu tiltøk saman við teirri broyttu studningsskipanarlóg, landsstýrið hevur lagt uppskot um, og tað at kommanditfeløgini ikki fáa sama studning sum onnur feløg, skulu tryggja javnan og sunnan vøkstur og endurnýggjan.

Sagt hevur verið, at realkredittstovnurin ikki hevur nóg mikið av peningi til útláns. Enn hevur hann kunnað rokkið, men verður torvur, er landsstýrið sjálvandi sinnað til at virka fyri at økja fæ hansara, men fyrr enn tørvurin er eyðsýniligur, er ikki orsøk til tess, tó skal ið hvussu er í 1973 samráðast um víðkan og møguliga um framhald av statsveðhaldinum fyri lánsbrov stovnsins.

Landsstýrið ætlar at lata lógina um veðhald fyri byggingum uttanlanda standa við, hetta kann gerast neyðugt, nú føroysku skipasmiðjurnar hava so nógvar byggingar til útlandið, at ilt er hjá føroyingum at sleppa fram at, tó er ætlanin at fáa sett í lógina ymsar treytir, sum ein er vorðin varugur við áttu at verið.

Á skipabyggingaøkinum sum á flestu øðrum er galdandi, at seglini eru so stór nú og byrðurin so góður, at ansast má eftir. Kósin er sett við skili, samráðingarlyndi og samráðingarvilja, og ætlanin er ikki at minka seglini.

**Saltfiskaveiðan:**

Hóast rakstrarúrslitini hjá flestu skipum í fjør var gott, vunnu summi av teim, sum longu í 1969 vegna ísviðurskifti og óhapp komu í trongstøðu, ikki burtur úr henni í fjør.

Landsstýrið ætlar tí, at kreppulógin, sum fór úr gildi 1. apríl, verður framlongd, so hjálp er tøk, um viðurskiftini annars tala fyri at hjálpa. Annars er úrslitið hjá onkrum línubáti higartil íár sera gott, manningapartar uppá 28.500 kr. hava komið fyri.

Veiðan hjá trolarunum tykist at hyldnast, men mangir teirra eru gamlir og ótíðarhóskandi, tí er gleðiligt, at menn eisini byggja nýggjar saltfiskatrolarar. Fyri hesar er tó talan um so stórar íløgur, at mangir aftra seg fyri at fara undir tær. Nakað av áhuga er fyri at fáa fatur á 3-5 ára gomlum, men tíðarhóskandi og vælroktum skuttrolarum til saltfiskaveiðu. Her eru eingir møguleikar fyri at stuðla frá almennari síðu, men ein átti kanska at umhugsa at funnið ein hátt til at stuðla keypi av einum lítlum tali – t.d. 2 ella 3 – av slíkum bátum. Kann finnast ein háttur, sum ikki gevur ta avleiðing,at meginreglan um, at endurnýggingin skal henda við nýggjum skipum, verður brotin, hevði hetta týtt, at vit nokur ár enn tryggjaðu okkum rímuligan lut í saltfiskamarknaðinum. Hetta vardi mót

eintáttan í søluni, og sum manningarpartarnir eru ídag, vildu hesi arbeiðsplsás ikki verið tey ringastu.

**Flakið**

er vorðin ein høvuðsstólpin í búskapi okkara, og framleiðslan er í óførum vøkstri.

Stórur partur av flakinum verður virkaður umborð á verksmiðjutrolarum, og týddu teir eitt óført framlop. Vit kunnu vist ekkaleysir stuðla útbygging av tílíkum bátum, – 1 ella 2 fyri fyrst, – men størsta dentin eiga vit at leggja á at virka nógva og góða flakavøru heima á landi.

Tíbetur er gróður í á hesum øki, virkini fáa javnari tilførslu enn áður, og er tað serliga línubátunum, sum veiða feskfisk fyri at takka, men trolingin á landleiðini og tað, at summir ídnaðartrolarar eisini veiða konsumfisk, hevur bøtt munandi um støðuna.

Tey mongu smáu virkini eru tó ov illa útgjørd til at taka stórar nøgdir í senn, sum talan er um, tá heilar skipslastir verða landaðar. Her má tí stórútbygging til við mekanisering og rationalisering, men hesa uppgávu greiða vit. Hesi smáu virki hava sýnt ófør evni at virka sum katalysatorar – íbirtarar — av útróðri á smáplássum, og kunnu nú við útbygging gerast hornasteinar í veruligum ídnaði úti um landið.

Men góðskuna hava vit ikki ansað nóg væl eftir, vilja menn vera við, tí verða stig beinanvegin at taka, sum kunnu geva okkum sama góða vørumerki innan flakaframleiðsluna, sum vit áttu og eiga sum saltfiskaframleiðarar.

Bátarnir mugu beinanvegin leggja um til at goyma veiðuna ísaða í kassum, hetta gevur góðsku og sparir teim nógva landingartíð. Virkini mugu syrgja fyri, at nóg mikið av feskum reinum vatni er til, at fiskurin verður vaskaður væl og virðiliga, áðrenn hann fer til skeringar. Landsstýrið og løgting mugu sum skjótast fáa greitt úr hondum lóggávu um góðskumet og eftirlit við fiski og fiskavørum. Landsstýrið arbeiðir í løtuni saman við vrakarastovni, fiskifrøðingi, fiskiídnaðarstovu og Fiskasøluni fyri at fáa hesa lóggávu framda.

Eitt lið afturat innan henda ídnað er eisini vert at kanna, tað er at royna specialbygdar feskfiskatrolarar, sum eisini kunnu veiða við pelagiskum tólum á leiðum uttanum okkara oyggjar, men uttanfyri sjómark, í Norðsjónum og við Ísland, tílíkir kunnu kanska tryggja rávørutilførsluna enn betri.

**Sildin**

hevur seinnu árini roynst okkum góð, og higartil í ár ikki minni góð. Bert spell, at so stórur partur av henni verður landaður uttanlands, ístaðin fyri at koma til viðgerðar á virkjum heima.

Vit kenna trupulleikarnar í hesum spurningi og mugu royna at vinna á teim. Høvuðsmeinbogin er tollgjaldið innan E.E.C. á virkaðum sildavørum, men eisini tann effektiva og bíliga viðgerð, aðrir kunnu geva henni, er mein kapping at basa.

Vit mugu umhugsa rationellar viðgerðarhættir, har flakaskering, salting, hermetikkídnaður og slógvviðgerð ganga inn í eina ella fáar produktiónslinjur.

Vit hava bert lítla orku til viðgerð av matsild, meðan liðið, sum skuldi verið annað liðið, er rættuliga væl útbygt, við tað at bræðingaorkan í Fuglafyri, í Gøtu, á Velbastað og Tvøroyri er rættuliga stór. Í løtuni fer tí sild, sum kundi verið viðgjørd sum matsild, beinleiðis til bræðingar, meðan tað rætta var, at helvtin gjørdist háverdug vatvora, meðan hin helvtin sum slógv fór til bræðingar og gjørdist háverdugt fóður. Hetta fáa vit vónandi rættað.

Fyri stuttum tók seg upp ein vandi fyri, at teir sum í løtuni taka ímóti og viðgera sild skuldu koma í harða kapping við aðrar, ella at hesir seinnu fóru at koma í kapping við útlendska fyritøku, sum keypti seg inn í Føroyum. At hetta skuldi hent vildi væl fáur, og tí hevur landsstýrið eftir førimuni roynt at virka fyri semju á hesum oki. Í løtuni sær út til, at loysn fæst, sum lutvíst er til nøgd fyri báðar partar, og sum sleppur okkum undan útlendskum valdi á einum tí størsta virkinum í landinum.

Tá hugsað verður um sildaveiðuna, sleppur ein ikki undan at taka við tað serliga viðbrekna, sum er henni egið. Vit høvdu væl av sild við Ísland og Føroyar, men hon hvarv. Vit funnu aftur torvur við Hetland og í Norðsjónum, men hon sigst at vera í vanda, og vilja menn tí verja hana. Vit sleppa tí ikki at veiða 70 dagar um árið. Tí er spurningurin, um vit ikki júst hava verið hepnir við útbyggingini av sildaveiðuflotanum, sum er so stórur, at hann veruliga munar, men sum ikki er størri, enn at vit tola eina umlegging afturat. Vit fáa nakrar bátar enn umbygdar, og nýbygdir verða fleiri, men man ikki eitt tal uppá 25 - 30 kraftblokkafør fara at verða mikið hóskandi fyri fyrst hjá okkum. Teir kunnu, um illa gongst við sildini, møguliga nýtast á lodnaveiðu norðanfyri. Fóru vit heilt yvir til umleggjan og nýbygging her, kundi smeiturin verið stórur, um sildin sveik.

Á NEAFC fundinum í London hendi annars tað týdningarmikla, at Føroyum bleiv lutað somu kvotu til í Norðsjónum sum øðrum londum; væl er hon lítil - - 1000 tons - -, men principielt er avgerðin av stórum týdningi, tí her varð okkara serstøða sum fiskiveiðutjóð viðurkend. Hesi 1000 tonsini ætlar landsstýrið, at føroyski ídnaðurin skal fáa gleðina av. Annars verður roynt á eykafundi í vetur at fáa avmarkingina av norðsjóarøkinum broytta soleiðis, at markið verður flutt av 4 stigum eystur á 0 stig og suður

mót Skotlandi, eydnast hetta, fáa vit Hetlandsleiðirnar aftur at troyta í teir 70 dagarnar.

Ein annar spurningur, sum reistur varð á hesum fundi, var atkvøðurættur føroyinga. Vit hava saman við Danmark havt eina atkvøðu, men víst bleiv til, at Føroyar longu í 1948 yvirtóku alt fiskivinnuni viðvíkjandi, og at tað tí statsrættarliga ikki skuldi verið nakað í vegin fyri, at Føroyar atkvøddu serstakt. Danir tóku undir við hesum, men meðan vit sum nevnt fingu kvotu javnbjóðis øðrum, varð ikki á hesum sinni støða tikin til ynskir okkara um atkvøðurætt.

Skamtingar fara ivaleyst at verða gjørdar í komandi tíð eisini, kanska ikki bert í Norðsjónum, men aðrastaðni við, tí er tað av avgerandi týdningi, at vit hesa ferð fingu somu nøgd sum tær størru tjóðirnar, kanska er her skaptur ein fortilburður (ella præcedens) sum vísast kann til seinni.

**Landbúnaðurin**

sýnir ikki úrslit síni í stórum eksporttølum, men av talvum yvir bruttofaktorinntøkuna fram til 1968 sæst, at í krónum og oyrum gevur landbúnaðurin nærum tað sama hvørt árið — umleið 15 mill. kr. — meðan hann procentliga eigur ein minkandi lut av faktorinntøkuni, men hvør krónan innan hesa vinnu telur eins nógv og aðrar, og er arbeiðið hjá okkara búnaðarmonnum av størsta týdningi fyri, at vælferðin og eydnan við at liva í hesum samfelag støðugt mennist.

Á teirri fíggjarlóg, framløgd verður fyrsta dagin, mælir landsstýrið til, at grein 17 um landbúnaðin fær nakrar hækkingar, herundir smærri studningshækkanir. Men batin í hesum er ikki stórur. Skal verunligur vøkstur koma aftur í framleiðsluna av mjólk, eplum, grønmeti, eggum og øðrum, má ikki bert ein útbygging av søluvegunum — distributiónsapparatinum — henda, men eisini ein sinnalagsbroyting hjá teim, sum landbúnaðin hava um hendi.

Samanleggingar ella samarbeiði við maskinstøðum og felagsfjósum gerast neyðug, soleiðis at fyrimunirnir av rakstri av størri eindum verða nýttir.

Alla aðrastaðni skipa búnaðarmenn seg í andeilsfeløg, hvat innkeypi, sølu og víðari viðgerð av framleiðsluni viðvíkur. Í so máta eru vit komnir ov stutt, hóast royndir hava verið gjørdar; t.d. ber ikki allastaðni í landinum til at sleppa av við alla mjólkina alt árið, samstundis sum ikki allastaðni í stórplássunum er møguligt at fáa føroyska mjólk til keyps.

Ein góð søluorganisatión, sum ræður yvir neyðugum kuldagoymslum, og sum kann flyta mjólkina niðurkølda til eitt stórt tal av sølubúðum um alt landið, átti at roynst so fræg, at hon vann kappingina við útlendska **konserveraða** mjólk. Sama átti at verið við føroyskum eggum. Nú er hentari hjá húsmóðrini at taka eitt ílæt við lítlum tali av útlendskum

eggum, heldur enn sjálv at telja sær føroysk egg í ein pappírsposa. Ivaleyst var meir av føroyskari framleiðslu keypt, var hon lættari at fáa fatur á hjá forbrúkaranum, hetta eisini um hon var nakað dýrari.

Vónandi fara feløg búnaðarmanna at vinna á hesum, men tá eiga tey eisini at leita sær allar smogur út til forbrúkarran, og vónandi festir tankin um felagsrakstur í størri eindum høtur hjá búnaðarmonnum.

Royndarstøð løgtingsins ætlar íár at byggja vakstrarhús, hetta er ivaleyst skil í, tí ídag er ikki lítið av grønmeti og blómum, sum innflutt verður. Ber til at spara her, er tað royndina vert.

Búnaðarlóggáva okkara er gomul, og sum øllum kunnugt sær tað út til at vera torført at fáa semju um nýskapan, men vónandi fer at bera til at fáa framt í hvussu so er nakrar ábøtur.

**Ídnaðarútbygging**

Sum mið og mál í sjeytiárunum er óivað semja um, at landsstýrið fer av øllum alvi at stuðla tiltøk og royndir, sum bera á hetta borð, soleiðis at vit kunnu ganga frá einari reinari fiskivinnuøkonomi til eina fjølbroyttari, har mekanisering av verandi virksemi og nýskaptur ídnaður eiga stóran lut.

Sjógvurin er og hevur verið álitið, men sleggjuni er eisini dugur í.

Vit vita øll, at Sjúrður hevði tað áræði og dirvi, sum vega kundi ormin, men Regin hin hegnigi og snildi smiður var hann, sum svørðið smíðaði. Ikki kann metast um, hvat størra týdningin hevði, tí áræði og dirvi so væl sum hegni og snildi kunnu í felag loysa úr lagdi, har áræði einsamalt ella snildi áleina ikki røkka.

Landsstýrið hevur sjálvt tikið ymisk uppskot til viðgerðar og kanningar, eins og ætlanir og royndir hjá monnum verða vegaðar og í mongum føri stuðlaðar. Menn hava í onkrum føri tikið yvir og arbeiða málvíst fyri at røkka víðari. Hetta er gott arbeiðslag, sum vónandi fer at frukta. Men landsstýrið fer ikki at gykla nokrum, at eftir stuttari tíð stíga ídnaðarvirkini upp sum fuglar Føniks víða hvar um landið. Vit vilja gera, hvat gerast kann fyri at skapa góðar fortreytir, og vit vilja royna at fevna so víða sum gjørligt í sakkønari viðgerð og stuðlan. Tá ivast vit heldur ikki í, at møguleikin fyri at finna gullkorn eisini verður hin størsti.

Ídnaðargrunnurin, skaptur bleiv í fjør, er nú farin at virka, hann hevur longu fingið hóp av umsóknum, og fleiri teirra hava fingið viðgerð.

Løgtingsins partur av grunnfænum er fingin til vega, og útlitið fyri, at grunnurin kann veita sær lagalig lán til víðari útlán, er gott. Í fyrstu syftu er ætlanin, at grunnurin skal røkja uppgávur á økjum, har fyrr hevur verið torført at fáa fíggjan, og á økjum har nýskapan kann gerast.

Fiskiídnaðurin verður so at nýta tær keldur, sum higartil hava runnið, men tær skuldu nú aftaná, at grunnurin er komin, sloppið at runnið kvikligari á fiskiídnaðarøkinum.

Skipasmíð í Føroyum hevur havt javna framgongd, bæði í byggjan av stórum stálskipum og minni útróðrarførum.

Í samarbeiði við Teknologisk Institut og aðrar serfrøðisstovnar hevur virkisdeild Búskaparráðsins sett skjøtil á at effektivisera arbeiði innan skipasmíð enn meir, við handverkaraskeiðum, leiðaraskeiðum og øðrum yrkisskeiðum verður roynt at slóða fyri nýhugsan innan henda ídnað.

Hetta skuldi helst borið á ta leið, at virkini á ymsan hátt samskipa seg, serliga hvat tekniskari umsiting, innkeypi og goymslu, standardiseran og specialiseran viðvíkur, landsstýrið vil stuðla hesum og fremja lóggávu, sum ger tað møguligt enn meira at troyta serfrøðingahjálp.

Í løtuni verður á teim størstu skipasmiðjunum bygt fyri útlendingar — í Havn fimm ferjur og á Skála 4 farmaskip — og orkan hjá hesum smiðjum røkkur ikki longri fyrstu tvey árini. Hetta er óivað gott, tí tað ger føroyingar kendar sum skipasmiðir, men samstundis er torført at fáa framt neyðuga føroyska bygging. Landsstýrið arbeiðir tí í løtuni saman við øðrum fyri, at bygging kann fáast ílag eisini á smiðjum, sum enn ikki hava tikist við nýgerð, harafturat verður arbeitt fyri, at partur av tí tilfari, skipasmiðjurnar nýta, verður gjørdur á vanligum smiðjum og verkstøðum og á skipasmiðjum, sum ikki enn byggja. Hetta skuldi borgað fyri effektivari nýtslu av tí kapaciteti, vit eiga.

Arbeiðsloysi er hvast svørð, tí er so neyðugt at kanna allar møguleikar fyri í hvussu er at framleiða tað, vit sjálvi nýta, bæði av amboðum og vørum, bæði úti og heima eiga vit fólkið, sum kann gera hetta, og tann dagin hvør einasti av okkum hevur í sær fyrst at hugsa um. um tað, honum tørvar, finnast sum føroysk framleiðsla ella kann gerast her, tá er skjøldrið mót hvøssum svørði eisini tilevnað.

**Lønarlagið**

hevur verið fyri broytingum íár. Fiskimenn og reiðarar gjørdu sáttmála tíðliga. Fiskimonnum vóru týðandi broytingar fyri serliga innan summar veiðugreinir. Arbeiðsmenn, arbeiðskvinnur og handverkarar fingu nýggjar sáttmálar. Ymiskt er, sum batin í teim verður mettur, og onkur heldur ivaleyst, at teir vóru ov dýrir samfelagsøkonomiskt sæð, men skuldi hesir lægst løntu stættir ikki fingið munandi bata eitt gott ár, fingu teir hann valla onnur ár. Talliga eru ábøturnar størri enn nakrantíð áður, men enn standa stættirnir á niðastu stigum í lønarstiganum. Sáttmálarnir galda í tvey ár, og er hetta til fyrimun bæði fyri samfelagið og partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Tænastumenn, lærarar, løgtingsmenn og landsstýrismenn fingu nýggj-

ar lønarlógir við munandi ábótum, og starvsmenn fingu sáttmála við landsstýrið, sum eisini gav stórar hækkingar serliga hjá teim lægstløntu. Hesin sáttmáli fekkst tíverri ikki í lag við samráðing, men bert aftaná verkfall í 21 dagar. Sár sita eftir hogg, sum undir verkfallstíðini fullu, men tíðin lekir hesi. Tað er metan mín, at allir partar djúpast sæð kunnu verða nøgdir við, at semja fekkst at enda, og samfelagið kann serliga gleðast um, at vinnulívið sjálvt slapp undan verkfalli.

Annars skerst ikki burtur, at í lønarlagnum eru ymsir skeivleikar, ikki bert at vit hava ein lánlønarspurning, serliga hjá teim, ið leingi ganga arbeiðsleys uttan stuðul, men mest tí at í mongum førum verða givnar so ymsar lønir fyri sama slag av arbeiði. Tað er glopp millum lønirnar hjá teim danskt løntu, dansk-føroyskt løntu og reint føroyskt løntu embætis- og starvsmonnum.

Onkur vil halda, at vit bert skuldu havt danskar lønir, hesum eri eg ikki ímóti, um trygglciki er fyri, at arbeiðsmenn og fiskimenn eisini fáa ta skipanina, men hesir sigast at fáa lønir sínar eftir føroyskari orku, og tí má uppgávan vera at fáa danskar og føroyskar lønir at samsvara. Hervið er ikki sagt, at danskt lønt skulu niður í løn, men um hildið verður eitt sindur aftur, kunnu hinar føroysku lønirnar líðandi hækkast, meðan samstundis skattatrýstið eisini líðandi verður flutt longur upp í stigan, so tað svarar meira til tey viðurskifti, donsku lønirnar eru settar eftir. Samskipan í vissan mun kann fáast, men lott verður uppgávan ikki, tí, sum sagt varð í viðmerkingunum til uppskotið um tænastumannalóg í 1966, vit hava felags arbeiðsmarknað við Danmørk og løgtingið hevur í fleiri førum givið seg undir treytirnar um ríkisløn til føroyskar embætismenn, tí má lønarlagið verða umleið hitt sama.

Nú allar aðrar lønir eru hækkaðar, samstundis sum úrtokan hjá flestu fiskimonnum er vaksin, heldur landsstýrið, at tað vil vera rímuligt eisini at hugsa um teir fiskimenn, sum hava roynt seg har, so ábært var, at teir ikki vunnu upp um minstulønarmarkið. Landsstýrið ætlar í hesi setuni at leggja uppskot fram um at hækka minstulønina. Rímuligt er, at henda hækking eins og hinar henda í tveimum stigum, íár og næsta ár. Hetta vil í løtuni ikki týða so stóra meirútreiðslu, men kann við bakkasti standa aðrar hækkingar við, tí megu vit hava ráð til hesar eisini.

Fyri hann, sum ikki hevur nóg nógv at tríva í, er lítil uggi í, at lønirnar hækka. Hann kundi komið upp í part, um vit í størri mun fingu heim ta veiðu, sum nú verður landað uttanlanda. Við vaksandi virksemi her heima fekkst eisini meir burtur úr teim høgu prísunum.

«Tað er eisini eitil í válgara» verður sagt, og tá saltfiskabátar okkara liggja í vikuvís uttanlanda og bíða eftir landingartørni, man stórur partur av vinninginum av teim høgu prísunum vera fokin aftur.

Upprunaliga komu Esbjerglandingarnar ílag eftir kravi keyparanna,

men nú fiskur er vorðin vøra, tørvur er á, mugu krøv keyparanna eisini vera linari. Landsstýrið hevur tí heitt á fiskaseljarar um at minka talið av landingum uttanlands og forða fyri, at bíðitíð verður hjá teim, sum tó koma at landa har.

Farið er eisini undir at kanna møguleikarnar fyri at selja saltfiskin í konsumpakkum hóskandi fyri vanlig húsarhald, tað kunnu hugsast sølu-ketir, sum áhuga hava fyri slíkum. Umboðsmaður landsins í Suðureuropa tekur lut í hesum arbeiði. Her er møguliga ein av vegunum til at gera nyttu úr okkara mongu saltfiskahúsum.

Samantikið so verður strembað ímóti at viðgera alla vøru mest møguligt herheima, veiðuna av fjarleiðum so væl sum heimaveiðuna, men tá áhugamál keyparanna eisini er at halda tilíka viðgerð ígongd heima hjá sær sjálvum, vera vit fyri tí, at lidnar vørur verða tollaðar væl hægri enn rávøra, og er tí torført at vinna á mál í hesum spurningi.

**Sociala trygdin**
verður alt meir útbygt. Semja er gjørd um, at tey, sum sitið hava í andglettum, ikki eiga nógv lunnindi í samfelagnum og nú ikki orka til fulnaðar at røkja samfelagsstørv síni, skulu hava best møguligu «service» frá tí almenna. Hesir møguleikar vórðu øktir í fjør við broytingum í socialu veitingunum. Hesi mál eru nógv umrødd, men tey hava áhuga hjá so mongum, tí er vert at strika undir

**at** heimildin til heimarøkt nú verður nýtt.

**at** tað framvegis er mál landsstýrisins at bøta um alla røkt av teim veikaru í samfelagnum, so tey sita lýggj, m.a. við at leggja teir stovnar, sum krevjast til hesi endamál í Føroyum, herundir byggjan av specialskúla til undirvísing av brekaðum, framhald av statshospitalsbyggingini og útbyggjan og samskipan av revalideringsarbeiðinum.

**at** halda fram vil bygging av ansingar- og røktingarheimum so skjótt byggingin í Miðvági er liðug. Tað, sum náttúrliga liggur fyri at byggja, eru deildir í samband við sjúkrahúsini í Klakksvík og á Tvøroyri, men avgerð er eingin tikin her, og onnur ynskir mugu takast við í metingini,

**at** landsstýrið hevur sagt ríkisstjórnini frá, at tað á ongan hátt kann góðtaka eina loysn, sum ger, at statshospitalsbyggingin kemur at standa í hálvum gekki. Landsstýrið vil samráðast um niðurskurð av íbúarbyggingini til læknar, sjúkrasystrar o.o., men vil hava framt allar tær viðgerðardeildir og pláss til allar tær sengur neyðugar eru til fullfíggjaða viðgerð.

Vit hava vónir um at nýtilig loysn fæst, t.v.s. ein loysn, sum ger, at vit ikki framyvir skulu senda okkara veiku av landinum, uttan tá teim tørva heilt serliga læknahjálp, sum ikki kann fáast nóg góð her heima. Framstigini innan medicinvísindina gera, at teim sinnisveiku ikki í sama mun sum fyrr tørva innlegging; tí verður møguligt at taka nøkur av plássunum, ætlaði til slíkar sjúklingar, í nýtslu til viðgerðina av teim andsveiku.

Spurningurin um skipan av arbeiðsloysistrygging, sjúkradagpeningi og ATP (eykapensjón) tykjast drúgvir at loysa, men játtaði stuðulin til arbeiðarafeløgini kann kanska fáa gongd á arbeiðsloysistryggingarmálið. Landsstýrið hevur heitt á feløgini um at samskipa seg á hesum øki, so játtanin kann fara í ein arbeiðsloysisgrunn heldur enn í fleiri.

**Skúlamál.**

Tveir nýggir skúlar eru tiknir í brúk, fleiri eru víðkaðir, og nógvir hava fingið viðbøtur. Skúlin í Sandoy er við at vera liðugur og kemur at kosta um 6 mill. kr.

Skúlahús standa í gerð í fleiri bygdum t.d. í Klaksvík, Tvøroyri, Hvalba, á Argjum og aðrastaðni.

Í onkrari bygd eru umstøðurnar so trongligar, at farast má undir víðkan av skúlanum t.d. í Gøtu.

Studningurin úr landskassanum til skúlabygging er hækkaður úr 20 % upp í 25 %, og hesa seinastu tíðina er mest at kalla allur studningurin útgoldin væl skjótari enn áður, so kommunurnar spara nakað av rentuútreiðslum. Klakksvíkar sjómannsskúli hevur í ár tikið nýtt skúlahús í brúk. Hetta er eitt framstig, men sjómanslæran øll treingir til útbygging. Fyrst og fremst er tað fiskiskiparalæran, men eisini læran hjá stýrumonnunum og skipsførarunum treingir til ábøtir á ymiskan hátt.

Fyri aðrar sjómenn og fiskimenn áttu eisini at verið møguleikar fyri útbygging og luttøku í skeiðvirksemi.

Nevnd er sett til fyrireikan av HF undirvísing í Føroyum, hon fær eisini til uppgávu at kanna tørvin á at fara undir fjølbroyttari undirvísing á studentaskúlanum, t.d. innan samfelagsfakini.

Tekniska útbúgvingin fær betri umstøður, nú skúlar verða bygdir, bert spell at so nógv av teim ungu skulu vera so nógv heimanífrá í undirvísingartíðini.

Fróðskaparsetrið hevur seinasta vetur havt hópin av næmingum, ið hava fingið væl burturúr teimum skeiðum og fyrilestrum, ið har hava verið hildnir. Tað er ynskjandi, at tað á ein ella annan hátt verður gjørligt at røkka longri enn higartil, antin við at farið verður meira út á bygd ella í samband viðútvarpið.

Í samband við stovnarnar á Debessartrøð verður skapt kanningarstøð matvøruframleiðslu viðvíkjandi. Henda nýskapan saman við ætlanini um

at byggja størri havrannsóknarskip økir munandi um møguleikarnar fyri at avrika vísindarliga arbeiði í Føroyum.

**Kommunalu viðurskiftini.**

Tann nevnd, sum sett varð at viðgera kommunalu lóggávuna, er við at hava fingið arbeiðið frá hondini, og uppskot verða løgd fyri tingið í komandi setu.

**Skattamálini**

hava allra størsta týdning fyri einstaka borgaran, fyrst og fremst tí hann skal gjalda skattin, og harnæst tí tað fyri hann hevur áhuga at kenna møguleikar hins almenna, løgtings og kommunu, at loysa tey mál, sum leika á hjá honum sjálvum.

Skattalógin hevur nógv ár á baki, hon hevur fingið ábøtur og broytingar mangan, tó meina menn, at ein verulig skattanýskipan er neyðug.

Men kunnu vit semjast um hana?

Kunnu vit semjast um gjaldingarháttin. Um kelduskatt ella skatt av inntøkum árið fyri?

Kunnu vit semjast um, hvussu stóran part av samfelagsskaptu virðunum (kapitalvinninginum við sølu av ogn, jørð, framleiðsluamboð o.ø.) — hitt almenna skal hava,

Kunnu vit semjast um býtið millum beinleiðis og óbeinleiðis skatt, og um vit skulu umskipa óbeinleiðis skattingina til meirvirðisgjald?

Kunnu vit semjast um skattafrádráttarreglurnar?

Allar hesar spurningar kemur løgtingið at arbeiða við, men ímeðan eru smærri broytingar gjørdar, og verða framvegis javnføringar at gera.

Í vár samtykti tingið uppskot frá landsstýrinum um at hækka barnafrádráttin fyri hvørt barnið úr 200 til 300 kr. ella úr 100 til 200 kr. alt eftir inntøkuni

Hesin frádráttur verður gjørdur beinleiðis í skattinum.

Láginntøkurnar fingu í somu syftu ein persónsfrádrátt upp á 1.000 kr. í skattainntøkuni til landsskatt, soleiðis at skattskyldugar inntøkur undir 11.000 kr. ikki koma undir landsskatt. Hesin frádráttur verður minkaður við vaksandi inntøku og verður ikki latin til inntøkur yvir 20.000 kr.

Mett varð, at minniinntøkan hjá landskassanum av hesum báðum samtyktum í ár er um 2,7 mill. kr.

Eisini uppskotið um, at tær ymsu viðbøturnar, sum gomul og brekað fáa afturat pensjónini, verða skattafríar, tók løgtingið undir við 3. apríl í ár. Broytingin kemur í gildi komandi skattaár og ætlast at kosta landskassanum og kommununum 1,4 mill. kr., við tað at umleið 4,5 mill. kr. verða minni at skatta av.

Lógin um bundna uppskaping loyvdi ikki, at peningurin bleiv loystur,

tá spararin keypti sær grundoki ella bygdi sær hús. Hetta helt landsstýrið vera skeivt, tí sparing í húsum er uppsparing við lít, og legði fram uppskot um broyting, og hon varð samtykt.

Maskinur til ídnað, handverk og EDV virkir sleppa undan 13 % gjaldinum, og uppskot er um at sama verður galdandi fyri skipsmotorar og størri lutir, sum nýttir verða í umvæling av útlendskum skipum í Føroyum.

Hetta skuldi gjørt føroyskar smiðjur kappingarførari, men hvat hesi bæði uppskotini geva í minni inntøku til landskassan, er enn ilt at meta um.

Innflutningsgjaldið fyri bensin hækkaði við 10 oyrum fyri at fáa vómuliga javnvág á fíggjarlógina til samferðsluendamál.

Umsitingin av toll- og innflutningsgjaldsskipanini er ikki nóg liðilig. Landsstýrið umhugsar at gera eina fasta skipan, har vørurnar hjá stórum innflytarum verða tollgreiddar beinanvegin, men har gjaldið verður gjørt upp og strangliga innkravt eina ferð um mánaðin. Hetta skuldi givið regluligari og liðiligari gjaldsskipan. Eisini verður hugsað um at byggja tollpakkhús, men verður áðurnevnda skipan gjørd, verður tað at hýsa gjaldstovuni og tolladministratiónini og teimum høgt tollaðu vørum; húsið verður tí minni enn upprunaliga ætlað.

**Ymsar nýskipanir** á skattaøkinum er ætlanin at gera. 31. juli 1970 skipaði landsstýrið nevnd til endurskoðan av skattalógini. Setningarnir nevndin fekk at greiða vóru hesir:

1) Nýggjar avskrivingarreglur.
2) Skipan av íleggingargrunni, har feløg og vinnumenn kunnu leggja niður part av yvirskoti til útbyggjan og endurnýggjan av vinnuni.
3) Reglur um, at hatt á einum ári kann verða frádrigið skattafrítt seinri ár.
4) Kannan av partafelagsskattareglunum.
5) at avskriving ikki dregur inntøkuna niður um tað, sum eginnýtslan er í árinum.
6) at kanna skattalógina í síni heild og gera uppskot til broytingar og møguligar nýggjar reglur, og undir arbeiðinum hava í huga kelduskattaskipanina, sum at kalla allir aðrir nú nýta.

Landsstýrið ætlaði, at summar av hesum broytingum skuldu koma í gildi longu komandi skattaár, og hevur nevndin tí longu viðgjørt fleiri av spurningunum og lagt uppskot fyri landsstýrið.

Í avskrivingunum er ætlanin at fara yvir til saldoavskrivingar og lata lógina um eykaavskrivingar fara úr gildi. Samstundis verður skotið upp

at tiðarmarka og minka forhondsavskrivingina upp á byggisáttmálar, hetta skuldi gjørt tað minni áhugavert hjá monnum at farið upp í kommanditfeløg, tí tá skipini eru bygd og koma undir saldoavskriving, er útlitið fyri avskriving yvir sjálvuppgávuna minkað munandi; í løtuni er persónligi fyrimunurin við avskriving í byggitíðini stórur.

Saman við reglunum um at binda pening í íleggingargrunnar skuldu hesar nýggju avskrivingarreglurnar kunna stuðla til íleggingar, bæði á sjógvi og landi.

Loyvi til at draga hall frá eftir ávísum reglum skuldi borið á sama borð; loyvt verður tó ikki at draga frá hall, sum íroknað er gjøgnum fleiri ár.

Eginnýtsluna er torført at skipa reglur fyri, einasta gongda leið her er at økja um vald og møguleikar líkningarmyndugleikanna.

Landsstýrið heldur, at neyðugt er at lívga produktivar íleggingar, serliga innan ídnað á landi, og tekur tí undir við at nýta líknandi avskrivingargrundarlag, sum nýtt verður í øðrum londum. Samfelagsborgarar flest halda ivaleyst, at feløg, sum hitt almenna ikki er ánari av, skulu lata fulla skatting av vinningi, men sum nú er, kunnu hesar reglur nýtast til at ávirka ella avmarka virksemið í samfelagnum, og er soleiðis eisini eitt amboð hjá teim stjórnandi. Men vit mugu tó altíð hava eyga fyri upphæddini, sum loyvt er at avskriva og laga hana eftir tørvinum á virksemi.

Hesar lógir koma allar til viðgerðar í tingsetuni, sum byrjar seint í oktober í ár.

**Príslagið.**

Prístalið 1. juli ífjør var 588 stig meðan tað 1. juli íár var vaksið til 625. Hetta er ein prísvøkstur uppá 6,3 %, og svarar hann toluliga til prísvøkst-urin í viðskiftalondum okkara, tey sum í so stóran mun avgera okkara príslegu.

Verður prísvøksturin hjá okkum storri enn annara, týður tað, at peningavirðið okkara minkar javnmett við teirra.

Tá virksemið er stórt í samfelagnum, er ilt at halda prísinum niðri, meðan øvugt, virksemið kann verða økt við at peningavirðið verður minkað. Hetta er fíggjaramboð, teir nýta nógva staðni; t.d. vita vit, at Brasilia við vilja líðandi lækkar peningavirðið fyri at økja um innlendis aktivitetin.

Framburðurin og tey góðu úrslitini hjá okkum ífjor kunnu dyggiliga setast upp ímóti tí prísvøkstri, verið hevur, og tá hann er nærum javnur við annara, er ikki orsøk til serligan ótta fyri javnvágin. Verri var um prístalið hækkaði uttan sjónligt vælferðarlag.

Men tað er vandi í hvørjari vælferð, tí mugu vit royna at gera tað lítla, vit við lóggávu og eftirliti kunnu fyri at hava tamarhald á prísvøkstrinum.

Annars er arbeiðið við at fáa tilvega húshaldsroknskapir, spurnarbløð

o.a., sum skal geva grundtilfar til nýggju prístalsútrokningarnar nú ígongd. Galdandi prístalsútrokning er avgjørt ikki í stevi við útviklingin.

**Desentralisering.**

Ein táttturin landsstýrið er vakið yvirfyri, er at forða fyri, at alt samfelagsvirksemi verður troðkað inn á heilt fá øki.

Tað er sannroynd, at hin stóra tilflytingin t.d. til Havnar, m.a. hevur ført við sær, at grundøkisprísurin er rokin upp í loft. Tað hevði gagnað okkara fólki meir, um ikki alt virksemi og allir almennir stovnar vóru lagdir í einum plássi.

Tað er eingin treyt, at allir skúlar landsins liggja saman. Tvørturímóti er tað vanligt, at hægri skúlar og aðrir almennir stovnar við liggja ymsastaðni, bæði gagnar tað teimum, sum gera nýtslu av lærdómsstovnunum, og hevur tað týdning fyri plássið, teir verða lagdir á.

Ein størri javnvág í samfelagsaktivitetinum er neyðug, t.d. tykist tað framvegis at vera torført at fáa læknar í øll størv, her er orsøkin ikki peningaspurningur, men heldur, at tað ikki er nóg atraktivt at seta seg niður á økjum har ikki eisini annar aktivitetur er í nóg stóran mun.

**Húsabygging**

hevur ikki havt tey lagaligastu kor. Arbeitt hevur verið fram ímóti einum prioriteringsmøguleika upp á 80 % og einum eginpeningi upp á 20 %, men leingi var tað ístaðin vanligt, at 80.000 kr. var mesta lænast kundi — hava bankarnir ofta gingið longur — nú er hetta markið hækkað.

Á fundi við landsstýrið søgdu peningastovnarnir frá, at roynt var at ganga upp í 100.000 kr. — við sama møguleika at ganga longur. Húsalánsgrunnurin eigur at fylgja við, og er tí seinru árini avsett munandi meira á fíggjarlógina til hansara.

Aftur á komandi fíggjarlóg mælir landsstýrið til at hækka játtanina.

Grunnurin fekk í fjør fyri fyrstu ferð javnvág millum innkomnar umsóknir og játtaði lán. Við hækkingini av grunnpeninginum og lániheimildunum, hann hevur, kann húsalánsgrunnurin nú eisini læna størri upphædd til einstaka byggiharran. Spurningurin kann skoyta enn meira uppí í seinna endanum.

Realkreditstovnurin ætlar sær undir fíggjan av størri húsabyggingum, sum samtykt á tingi í fjør. Tekniska viðgerðin í samband við útgávu av serligu lánibrøvunum til hetta endamál er tó ikki liðug enn. Heldur ikki samráðingarnar um sølumøguleikarnar eru lidnar, men vónandi fer her skjótt at renna enn ein løkur til tostandi íbúarloysingar.

**Samfelagsviðurskiftini**

eru stórliga broytt. Stórarbeiði fara fram um alt landið, bæði í havna-, brúgva- og vegabyggingum. Íleggingarnar eru stórar, og vóru óivað ikki greiddar uttan lagalig lán úr íleggingargrunninum — 60 mill. grunninum — hesin fíggjar vegabyggingarnar innan høvuðsstrekkini.

Sum frásagt fyrr í ár á tingi verður dentur lagdur á við hesum lánum at fáa framt størstu arbeiðini í veganetinum Tórshavn — Klaksvík og Tórshavn — Vestmanna komandi fýra - fimm árini. Hartil strekkið Hov — Vág og Sandavág — Hálsin.

Væntandi verður brúgvin um Sundið liðug í fíggjarárinum 72/73, og bergholið í Eysturoynni í 74/75.

Umframt arbeiðini, sum fíggjað verða við lánum úr íleggingargrunninum, verða mong onnur at gera, t.d. asfalteran um alt landið, breiðkan og reguleran av eldri vegastrekkjum, brúgv um Hvannasund o.s.fr.

Harumframt kemur, at nógvar vegagerðir til smærri bygdir eru samtyktar á tingi, men peningur er ikki avsettur til teirra. Landsstýrið hevur av hesum orsøkum í fíggjarlógaruppskoti sínum hækkað greinina til samferðsluendamál munandi og mælt til, at ein serlig konto verður avsett til gerð av vegunum til smáplássini. Av hesi játtan kunnu so nýtast nøkur hundrað túsund hvørt árið; tá verða vit at enda — kanska um 10 - 20 ár — at hava rokkið málinum, at samband er til allar bygdir, sum kunnu fáa tað.

Eitt gott vegasamband kann eisini spara okkum útreiðslur innan lendinga- og havnagerðina.

**Strandferðslan** er ídag før fyri at geva nógv betur «service» enn nakrantíð áður. Í fjør komu fleiri før í nýtslu, og aftur í ár verður flotin øktur, tíverri varð Sandoyarbáturin ikki liðugur til Ólavsøku sum ætlað, men hann verður latin okkum um mánaðarskiftið august/september. Hetta er tó ikki stór seinkan í mun til hvat vanligt er.

Strandferðslan verður rikin við undirskoti, men hon er sum eg segði í fjør — ein av teim skyldum, samfelagið hevur. Siglingina er neyðugt at uppihalda, hóast farma- og flutningsgjøld ikki svara til kostnaðin av rakstrinum. Undirskotið komandi fíggjarár er mett til 2 mill. kr.

**Telefonverkið** er farið undir eina meginútbygging, sum komandi fýra árini gevur meginpartinum av landinum automattelefon. T.d. kann í heyst ringjast beinleiðis úr Havn til Klaksvíkar uttan bíðitíð. Tað eru langar leveringstíðir uppá tekniska útgerð innan telefonumráðið, tí krevur útbygging planleggjan langa tíð framyvir, men hon er nú løgd í fasta legu, og verður tí ikki so leingi at bíða hjá teim, sum í løtuni ikki hava full-

fíggjað samband. Eisini hesa bygging fíggjar 60 mill. grunnurin fyri størsta partin.

**Loftferðsluspurningurin og flogvallarspurningurin** hava báðir átt miklan áhuga í fólkinum farna árið. Hin fyrri kanska serliga, tí skifti kom í hjá teim, sum flúgvingina reka, seinni mest tí, at nú fyriliggja ymisk úrslit av veðurkanningum, gjørdar eru á Glyvursnesi og við Toftavatn.

Í spurninginum um raksturin av flúgvingini hendi í vár tað, at full semja gjørdist millum allar føroyskar partar — almennar og privatar — um stevnumiðið. Tað er at mest møguligt av flutninginum av fólki, posti og frakt úr Føroyum og til Føroya skal vera á føroyskum hondum. Út frá hesum eru vit farnir í samráðingar við ríkismyndugleikar, SAS og aðrar. Enn stendur í botni, og enn eru ikki bjóðaðar okkum treytir, sum vit halda hóska. Men nú vit standa sum ein maður við tingsamtykt aftanfyri okkum, ber til at vera treiskur, og tá verður eisini vunnið at enda.

Kanningarúrslitini viðvíkjandi flogvøllinum eru løgd fram í dag, og soleiðis kunngjørd tingmonnum. Tíverri hava hesar kanningar ikki havt so góðar umstøður, sum ynskjandi var. Vindmátararnir hava kanska — um enn ikki av dýrastu konstruktión — verið góðir nokk, men mjørkakanningarnar hava ikki verið so nágreiniligar, við tað at møguleikin at mjørki er á kanningarstøðini, meðan klárt er ymsa aðrastaðni, ikki sýnist at vera tikin við.

At hetta verður sagt, er eingin atfinning til teirra, kanningina hava haft um hendi. Tá kanningar skulu gerast, má kostnaðurin av at fara heilt til botns í kanningini altíð samanberast við meirnyttuna, ein fær av hesum, sammett til minni gjølligar kanningar.

Uttan iva eru tey úrslit, nú fyriliggja, virðismikil í metingini av, hvar flogvøllurin skal leggjast.

Eg havi fyrr sagt á tingi, at hesi úrslit ikki leiða til nakra beinleiðis konklusión, og hetta haldi eg framvegis. T.d. var longu í fyrru kanningini gingið burtur frá einum plássi, sum flogtekniskt er vælegnað, bíligt at útbyggja, men hvat innlendis samferðslumøguleika viðvíkti, tá varð mett at liggja óhøgliga fyri. Hesin og aðrir møguleikar kunnu kanska ídag takast við.

Tekniskt besta loysnin, haldi eg, má vega mest, hóast samfelagsokonomisk sjónarmið eisini telja. Sett verður nú nevnd av føroyskum og donsku myndugleikum og felogum til at vega øll úrslit, sum fyriliggja. Henni verður sett stutt freist, og síðani mugu føroyingar gera úrskurð.

Flogvøllur verður eingin bygdur, fyrrenn føroyingar endaliga hava sagt hugsan sína, men tá skuldi kunna gingið rættuliga skjótt.

**Ferðamannaflutningur** eftir sjónum er í afturgongd allastaðni, vit frætta ofta um feløg, sum leggja rutur niður. Tað hevur gingið striltið at fáa ferðamannasiglingina upp á Føroyar at bera seg, tí er hon í afturgongd. Vit mugu gera okkum greitt, at tann dag, einki er at vinna meir, heldur siglingin uppat, og krav verður reist til hitt almenna um at halda fram. Tingið sleppur kanska skjótt at gera upp støðu sína her.

Kundu vit við einum eitt sindur aktivari turistpolitikki byrt undir ferðamannastreymin, vóru kanska enn møguleikar innan skiparaksturin.

Nakað verður gjørt við bygging av gistingarhúsum, vallaraheimum og hotellum, og turiststreymurin veksur. Men henda útbygging má vera í samljóð við aðra, og spurningurin er eisini, hvussu stórt tal av fremmandum, vit ynskja her. Gestablíðir eru føroyingar, men vit fara so aldri at liva av at sýna okkum sjálvar fram. Men vit nýta skjótt nógvan pening til ferðir uttanlands og eiga tí at royna at fáa javnvág aftur við at bjóða nakað av fólki higar,og tað er heldur ikki bert útlendingum, vit skulu byggja fyri. Í vælferðarsamfelagnum er tað «mentalhygiejniskt» av týdningi, at føroyingar sjálvir sleppa at ferðast í Føroyum.

**Undirgrundin**

undir Føroyum og føroyskum havoki hevur fingið áhuga hjá teimum, sum fáast við oljuframleiðslu. Hetta er ikki so nýtt, sum blaðskrivingin fyri stuttum bendi á. Fyrsta umsóknin um einkarrætt til seismologiskar kanningar og møguliga framleiðslu kom til landsstýrið á heysti 1969, og í løtuni hava vit fýra umsóknir liggjandi. Landsstýrið hevur biðið embætismenn og serfrøðingar kanna, hvussu danir, norðmenn, íslendingar og grønlendingar hava borið seg at í tílíkum málum. Tað hevur ikki verið orsøk til at skunda sær, tí avleiðingarnar av skeivum atburði kunnu verða mangar, og um møguleikar finnast her, skuldu vit fingið sum mest burturúr.

Rættindi til at framleiða úr havbotninum, og víddin av økinum, hvørt landið eigur, koma til viðgerðar á alheimsfundi í 1973; fyrireikingunum til henda fund fylgir landsstýrið væl við.

Undirgrundsrættindini standa undir B-málum í heimastýrislógini, men enn eru so allar avgerðir teimum viðvíkjandi latnar til heimastýrið at taka. At møguligur ágóði eisini kom Føroyum til góðar, skuldi heldur eingin ivi verið um, tað er í tráð við allan andan í heimastýrislógini, men annars ber jú til at samráðast við ríkisstýrið um yvirtoku av hesum máli.

**Dálking.**

Í 1972 verður ST fundur í Stockholm um dálkingina á havinum; fyrireikandi arbeiði til fundin er leingi farið fram, m.a. var fundur í London 14. – 18. juni, og heldur hann fram í Kanada 8. – 12. november í ár.

Á hesum fundum verður funnið fram til tey vandamiklastu evni, sum í havið verða tveitt, hvaðani tey koma, og hvørja ávirkan tey hava, eisini verður arbeitt fyri at fáa ein heimsumfatandi sáttmála, sum bannar dálking av høvunum.

Hetta arbeiði hevur okkara størsta áhuga.

Hendingin nýliga við «Stellu Maris» er kanska ein lukkulig hending, við tað at hon effektivari enn áralong skriving um málið gjørdi vart við vandan, sum vit liva undir.

Í hesum máli, sum í so mongum, er neyðugt at taka í egnan barm eisini. Vit hava ikki givið dálkingini slíkan ans, at byrgt er fyri henni í okkara egna landi. Her er ikki ov væl vorðið.

**Føroyar og samgongurnar.**

Føroyar er limur í Efta, og Føroyar hýsa sum **partur** av danska ríkinum radarstøð, sum er lið í Nato verjuni.

Fyri at taka hetta seinna fyrst, so er tann blaðskriving, sum sigur, at landsstýrið hevur lagt seg oman á samtyktina hjá tinginum um radarstøðina, ósonn. Tingið samtykti í august seinasta ár at heita á stjórnina um at kanna møguleikan fyri, at løgtingssamtyktirnar frá 1940 og 1960 verða settar í verk, soleiðis at mjørkadalbingar fara av landinum. Hetta kunngjørdi landsstýrið stjórnini seinasta heyst.

Landsstýrið hevur beint í vikuni fingið svar frá stjórnini, sum sigur, at samtykt løgtingsins verður tikin við í allari viðgerðini av verjupolitikki Danmarkar. Annars fær tingið í heyst meira tilfar um hetta mál.

Tíðindini um, at Ísland vil hava amerikumenn at rýma av Keflavíkarstøðini, hava ikki givið landsstýrinum orsøk til serlig tiltøk, í álvara verða gitingarnar um, at vit kunnu vænta meira krígsútgerð inn á føroyskt landaøki, ikki tiknar. Tíðin fram til 1974 er eisini long enn, men kemur slíkt uppá tal í álvara, vil landsstýrið sjálvsagt gera vart við seg beinanvegin.

Efta limaskapurin fer, um víðkanin av EEC samgonguni gerst veruleiki, óivað at missa týdning. Landsstýrið og flokkarnir aftanfyri tað standa, hava mett, at Føroyar dyggiliga áttu at fylgja við tí, sum hendir í samráðingunum um víðkanina, og at Føroyar kannar, undir hvørjum treytum, tær kunnu taka lut í samarbeiðinum. Tað hevur verið sagt fyrr, at annað vildi verið ábyrgdarleyst, og tað er eisini sagt fyrr, at harvið er eingin støða tikin.

Støða verður heldur eingin tikin, fyrrenn allir møguleikar eru vegaðir á fínvág. Landsstýrið ætlar ikki at taka óráð fyri og ætlar ikki at førka fótin, fyrrenn vit eru í tryggari torvu, og eingin annar enn føroyingar sjálvir skulu taka endaligu avgerðina.

Allir spurningarnir í samband við EEC eru álvarsligir, men tað er eins

og spurningurin um rættin til at verða innanfyri fiskimark, er hann, sum ber av øllum.

Tað hevur ikki enn verið møguligt at fáa endalig tilboð fiskivinnupolitikkinum viðvíkjandi frá felagsmarknaðinum. Hetta kemst av, at allir menn har eru greiðir yvir, at okkara støða er so serlig, at vit hava krav uppá at fáa sertreytir. Hesar vilja teir ikki seta, fyrrenn spurningarnir hjá Onglandi, Írlandi og Noregi eru greiddir. Har føroyingar fáar ella ongar alternativar møguleikar hava til fiskivinnu, so hava hesi lond slíkar, og er tí ætlandi ikki sami tørvur á viðgongdum serskipanum hjá teimum, sum hjá okkum.

Tað er fastsligið, at Føroyar kunnu standa uttanfyri, sjálvt um Danmark fer uppí, og Føroyar fara ikki uppí uttan samtykt løgtingsins. Ein donsk avtala við E.E.C. má tí hava tað fyrivarni, at Føroyar kunnu haldast uttanfyri, og ein donsk fólkaatkvøða um limaskap Danmarkar má eisini gerast undir teirri fortreyt, at føroyska heimastýrinum sjálvum er latið at taka avgerð um møguligan limaskap. Um henda avgerð skal takast av løgtinginum ella við fólkaatkvøðu, kemur løgtingið at taka støðu til.

Í heyst -- møguliga longu í september -- verður farið víðari við samráðingunum um fiskivinnupolitikkin og um treytirnar viðvíkjandi Føroyum, tá fyrstani ber til av álvara at fara undir tjakið um fyrimunir og vansar hjá okkum.

Fortreytirnar undir føroysku metingunum verða eisini avgerandi broyttar, um Ongland, Danmark, Noreg og Írland verunliga fara uppí, tí kemur óivað nógv av tí, sum higartil er sagt um felagsmarknaðin, at vísa seg at vera burturvið.

Tilfar um fyribils úrslitið, danir hava fingið í Brüssel, verður eisini ídag lagt fyri tingmenn og pressu, og landsstýrið fer at leggja orku í, so fullfíggjað sum gjørligt, at siga frá samráðingunum, so hvørt tær fara fram.

Málið um víðkað **sjómark** er ikki bert uppi í samband við felagsmarknaðin.

Avmarkingar fara allastaðni fram. Noreg hevur flutt út sjómarkið, Ísland ætlar at flyta út á 50 fjórðingar. Canada koyrir okkum útum seinni í 70'unum, og í Grønlandi verður møguliga avmarkað í samband við E.E.C., vit mugu tí gera ta støðu upp, sum vit skulu framhalda við altjóða fundarborð um hesi mál.

At flyta út á 50 ella 100 fjórðingar gevur okkum ikki aftur tað, vit missa. Neyvan heldur um vit røkja økið aldri so væl og viðgera fongin aldri so langt.

Tað verður, sum støðan er beint nú, ein ólukka fyri okkum, um Ísland flytur út á hálvt hundrað, hon kann broytast, jú men, og samráðingar

kunnu geva nakað, men í løtuni fáa vit stórar trupulleikar.

Okkara støða má vera, at væl stuðla vit fiskivinnulandanna rætt til at troyta egið oki, men lívsrættur hjá teim, sum liva av fiskivinnuni eina, má ikki skerjast, men rúmkast. Tí mugu okkara ræsir vera so víðar, okkara rættindi so stór og okkara kvotur so stórar, at vit kunnu vaksa um fíggjarorku okkara so nógv, at her er eins liviligt og aðrastaðni.

Sjómarksspurningurin kann fyri føroyingar gerast eitt tvíeggjað svørð. Tó skulu vit ikki ganga á leistum í hesum máli, men allastaðni berjast fyri lívsrætti okkara.

**Umsiting landsins**

verður at útbyggja skulu vit kunna røkta øll tey øki, sum hon í nútíðarsamfelagnum fevnir um.

Skal hon stuðla við skynsemi, kanna nágreiniliga, ansa eftir dyggiliga og plánleggja effektivt, ber ikki til at halda fram við tí manningartali, higartil er eydnast at fáa.

Hitt almenna virkar í dag á so mongum økjum, at nærum kann sigast, at einki virksemi fer fram uttan at tað á ein ella annan hátt hevur samband við løgting, landsstýri, kommunu ella annan myndugleika.

Samvinnan millum vinnulívið og hitt almenna er stór, og einstaklinginum fylgir samfelagið frá vøggu til grøv.

Hetta má hann tó ikki kenna sum haft, ið forðar honum at fáa størsta mát av eydnu, nøgd og vælferð, og skal tí umsitingin virka væl, effektivt og smurt. Men fyrst og fremst skal umsitingin sum tænarar hins almenna – - løggevaranna – - verða við til at skapa fortreytirnar og plánleggja framtíðarútviklingin.

Henda plánleggjan má miðvíst benda á konsolidering og tryggjan av orku samfelagsins, má hava langtíðar skapanarevni og eiga í sær drívkraftina til samarbeiði millum menn, flokkar og stovnar.

At byggja eina umsiting, sum orkar hesa plánleggjan, verður stórtak, men loysa vit tað, verður plánleggingin eisini tann Grani, sum bera okkum kann gullið av heiði. Vit fella ongan dreka í sjálvdrátti, men bert um samfelagið alt stendur aftanfyri.

Saðla vit henda Grana, nýta vit áræðið Sjúrða og hegnið hjá Regini smiði, røkka vit, um so fáir verða okkum dyggir.

---

(Sí eisini skjal 6: Skjøl til Logmannsrøðuna 1971).